**Spurningur 1:**

Ein veitari hevur spurt inn til linju 35 í excelskjalinum, har víst verður til músina Logitech M605. Tey finna onga slíka mús.

**Svar:**

Hetta er ein feilur – rætta vøran er Logitech M650.

---

**Spurningur 2:**

Kunnu vit bjóða alternativ til tær ymisku Logitech, Jabra/Yealink og Bose vørurnar tit skriva í feltinum "Dømi um vøru sum er vælumtøkt og vit halda er nøktandi", ella er einans áhugi í júst hesum vørum/modellum?

**Svar:**

Hasi merkini verða nevnd tí hatta eru tey merkir, sum hava tann standard, sum dómsnevndin ynskir. Til ber at koma við øðrum merkjum, men tá dómsnevndin meta um vøran er nøktandi. Um dómsnevndin metir ein alternativ vøra ikki er egnað, so verður hon vrakað.

---

**Spurningur 3:**
Tit skriva "Av tí at vit hava HP teldur, so má hesin skermur verða HP, vegna dokk" við nakrar skermar. Kunnu hesir skermar vera frá øðrum merkjum enn HP, tá dokkin hevur USB-C og riggar við HP teldum?

**Svar:**

Vit vilja halda okkum til HP, tá tað eru ymiskar funktionir, sum bert rigga við HP útgerð.

---

**Spurningur 4:**

Vit finna ongan 40" skerm sum hevur meira enn 100hz og hevur webcam. Ber tá til at góðtaka skerm við eksternum webcam?

**Svar:**
Tað ber ikki til at koma við eksternum webcam. Gevið tó gætur, at um veitari bjóðar upp á ein rammusáttmála og er bíligast, men mangla onkra einkulta vøru, so ber kortini til at vinna samlaða útboðið.

---

**Spurningur 5:**
Kunnu bíligari VA panelir góðtakast, ella skulu skermarnar hava IPS panel?

**Svar:** Vit halda fast við kravið um IPS-panel, tí IPS gevur betri sjónarvinklar og meira støðugar litir og myndagóðsku, serliga í uppsetingum við fleiri skermum.

---

**Spurningur 6:**
Kunnu tveir veitarar í felag geva tilboð uppá rammusáttmálan um KT-útgerð?

**Svar:**
Tað er møguligt hjá tveimum veitarum at bjóða upp á rammusáttmálan í felag, tá talan er um samstarv um vørur, sum eru sjálvstøðugar. Tað vil siga, at vøran ikki skal knýtast til aðrar vørur í útboðnum. Sum dømi um vøru, har til ber at samstarva, er fartelefonir, meðan dømi um vøru, har ikki ber til at samstarva, eru kaðlar til skermar – tí hesir mugu verða frá sama veitara sum skermarnir.